**HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

14. februar 2019
Mál: 18/00943-2
Viðgjørt: JS/BL

**Viðvíkjandi markinum millum abort og eina deyðføðing**

Tann 1. september í fjør varð Sundhedsloven[1] sett í gildi í Føroyum. Ein av ásetingunum í lógini (§ 189, stk. 1) ásetur greitt markið millum abort og eina deyðføðing, sum sambært lógini er 22 vikur. Tað hava annars verið ivamál um markið í Føroyum er 22 ella 28 vikur, og tí metir Heilsu- og innlendismálaráðið at tørvur er á at kunna um hesa staðfesting í lógini.

Ásetingin í § 189, stk. 1 í Sundhedsloven er soljóðandi:

> "**§ 189.** Bestemmelserne i afsnit XIII finder tilsvarende anvendelse på børn, der efter udgangen af 22. svangerskabsuge fødes uden at vise livstegn (dødfødte børn)."

Viðmerkingarnar til hesa grein eru soljóðandi:

> "Bestemmelsen indebærer en lovbestemt grænse mellem abort og dødfødsel. Det fastslås, at et foster, der fødes efter udgangen af 22. svangerskabsuge uden at vise livstegn, er at anse som et dødfødt barn. ... Bestemmelsen af, om et foster kommer til verden efter udgangen af 22. svangerskabsuge, skal som hidtil træffes på baggrund af en lægefaglig vurdering af, hvilken alder fosteret må antages at have når det kommer til verden. Et foster, der fødes inden udgangen af 22. svangerskabsuge uden at vise livstegn, anses som en abort. Børn som efter fødslen viser livstegn, anses som hidtil som levendefødte uanset tidspunktet for fødslen."[2]

Í "Vejledning om kriterier for levende- og dødfødsel mv."[3] stendur harumframt m.a. soleiðis:

> "Såfremt der ikke iagttages ... tegn på liv, efter at barnet /fostret er fuldstændigt født eller fremhjulpet, er der tale om en fødsel af dødt barn (dødsfødsel), såfremt svangerskabet er gået mindst 22 fulde uger. Der skal således (jf. sundhedslovens § 189, stk. 1) udføres ligsyn og udstedes dødsattest efter ligsynslovens bestemmelser herom. Dette gælder uanset, om baggrunden evt. måtte være et indgreb foretaget i henhold til abortlovens bestemmelser."

Við øðrum orðum merkir tað, at um eitt fostur verður føtt eftir at 22. vika er farin aftur um bak skal tað metast sum eitt barn, óansæð um tað gevur lívstekin frá sær ella ei. Um tað

[1] Anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven
[2] Karnov: Sundhedsloven med bemærkninger (https://pro.karnovgroup.dk/document/7000832368/1)
[3] Vejledning nr. 2005-08-31 nr. 9623 om kriterier for levende- og dødfødsel mv.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

verður føtt áðrenn 22. vika er farin aftur um bak er talan um ein abort – uttan so, at tað gevur lívstekin frá sær eftir at tað er føtt.

Spurningurin um tað er talan um ein abort ella eitt deyðføtt barn hevur týdning fyri rættindini hjá kvinnuni aftaná føðingina, t.d. í sambandi við barsilsfarloyvi við meira. Um børn verða fødd eftir at 22. vika er farin aftur um bak, óansæð um tað er deyðføtt ella ikki, er talan um eitt barn, sum t.d. skal verða partur av burðarhagtølunum og líksýn skal fremjast. Eisini skal skrivast ein deyðsváttan og barnið, ið er deyðføtt, skal jarðast og skrivast í kirkjubókina umframt at faðirskapurin skal staðfestast.

Vinaliga

Jan Simonsen
deildarstjóri